# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

**Leikskrá nr. 5**

# Landskapping ÍF-KÍ

**Leygardaur 12. august 2000**
**Kl. 17.00 í Fuglafirði**



MIKLAGARÐUR
SMS Tel 31 30 11

HAVSBRÚN

# Tað halda vit.....

Nú rullaði so aftur, og leikararnir hava leikt sín fyrst dyst eftir eina vælunta og hart tiltrongda frítíð frá bóltspælinum. Tó so - teir høvdu bert frí frá bóltinum í 14 dagar, tí longu 10. juli byrjaði venjingini aftur. So seriøst kann tað sigast at verða, tí tað munnu verða fá 1. deildarlið, sum veruliga fóru í gongd aftur við sína venjing so tíðliga. Sostatt skuldu okkara leikarar verið væl fyri, nú seinna hálva er eitt umfar - og ein sigur - gomul. Nevnliga 0-2 sigurin á LÍF í Leirvík seinasta vikuskiftið. Málskjúttarnir vóru tveir nýggir mans á liðnum. - Høgni á Lakjuni, sum 1. hálvu leikti við NSÍ, og John Thomsen, sum hevur verið skaddur leingi, men nú endiliga er við at koma fyri seg aftur. Og tað at tveir nýggir mans longu eru at síggja á liðnum í fyrsta dystinum í seinnu hálvu, vísir eisini, at breiði hópurin nú er vorðin enn breiðari. Tað er bara gott. –Tí kapping um plássini, tað krevst. Og til tykkum, sum antin mugu víkja ella sum framvegis ikki hava fingið møguleikan: drívið á, missið ikki mótið, men verið ístaðin framhaldandi við at tryggja tann breiða hópin, og harvið at altíð teir leikarar, sum eru best fyri, í ávísu løtunum, leika dyst. Gera tit tað, so gerst seinna hálva av landskappingini í ár - fyri okkara viðkomandi - enn betur fyrra hálva var. Tað er púra vit!!!

Góðan dyst, og drívið á dreingir!!!

# ÍF - KÍ

11. umfar í landskappingini
hjá
2. deild monnum
12. august 2000

## Leikskrá 5

**Útgevari**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd**
*Andrea Lervig*

**Myndir**
*Sosialurin/Álvur Haraldsen*

**Kápumynd**
*Roy roynir at vinna bóltin av Tomislav Civic, B36, í dysti í Gundadali. Myndin er frá dystinum ímillum B36 og ÍF í Gundadali 23. august 1998. Dysturin endaði við 7-2 sigri til B36. Mynd: Álvur Haraldsen*

**Prent**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting**
*Rógvi Róin*

# Dysturin í dag

*ÍF bjóðar gestunum at vera vælkomnar til Fuglafjarðar*

Gestir okkara í dag hava higartil ikki havt eitt serliga væleydnað kappingarár. Teir liggja á næstaftasta plássið við 9 stigum fyri 10 dystir. Kanska eitt sindur løgið, tá besta liðið hjá klaksvíkingum liggur í toppinum í 1. deild, og klaksvíkingar harafturat eru kendir fyri at ala upp nógvar góðar fótbóltsleikarar. Men samstundis er hetta kanska enn eitt prógv um, at feløg, sum hava lið í 1. og 2. deild, leggja so stóran dent at fáa góð úrslit í bestu deildini, at næstbesta liðið hevur ilt við at klára seg í síni deild. –Fyrst og fremst tí, at allir teir frægastu leikararnir verða nýttir á besta liðnum, og síðan møguliga, tí at felagið ikki vísir hesum liðnum nóg stóran áhuga, við eitt nú venjara/um og annars øðrum kørmum, sum skulu til, fyri at fáa góð úrslit.

Sjálvt um tað ikki hevur gingist gestum okkara serliga væl higartil í landskappingini, og samstundis, sum vit vunnu fyrra dystin í Klaksvík heili 1-7, so skulu vit ikki undirmeta teir. Teir hava nógvar góðar leikarar, sum eiga at kunna geva einum og hvørjum liðið í 2. deild harða mótstøðu. Og tað fekk árstalsfelagið úr Havnini, B36, so sanniliga at merkja, tá teir vóru og vitjaðu í Klaksvík seinasta leygardag. Teir blivu "bankaðir" av. Úrslitið gjørdist 4-1, og tað talar fyri seg. - Og verður hugt at leikartilfarinum tann dystin - og sum eisini sæst á síðu 15 - so var talan um leikarar, sum hava roynt seg á besta liðnum oftani. –John Ryan, Tomislav Sivic og Fríðin Ziskasson eru bert nakrir. Hesir skuldu borga fyri góðum fótbóltsspæli. -Men hinvegin, so eiga okkara leikarar at verða somikið nógv betur fyri enn leikararnir á mótstøðuliðnum í dag, at vit eiga at vinna dystin. –Okkara leikarar hava vant hart og miðvíst líka síðan í februar mánaða og úrslitini hava verið væl betri enn tey hjá klaksvíkingum, sjálvt um tey kanska ikki hava verið nøktandi, tá hugsa verður um, at vit fluttu niður úr 1. deild seinasta kappingarár. –Og afturat hørðu og miðvísu venjingini, høvdu leikararnir ikki serliga langan summarsteðg frá venjing. - 14 dagar, og so 100% aftur. Men tað eru treytirnar, um tú skal verða við í toppinum, og serliga nú, tá úrslitini hava verið ójøvn, og vit harvið kappast við fleiri lið um besta plássið í deildini.

Tí er hvør einasti dystur týdningarmikil - ikki minst tann í dag. Hann má og skal vinnast. –Sjálvsagt kunnu vit vóna, at hini liðini, sum vit kappast við, tapa sínar dystir, og harvið hjálpa okkum, men tað flyta vit ikki upp í bestu deildina uppá - tað er vist!! Og ber tað so í bandi, at vit flyta upp, so eru krøvini

*(framhald á bls. 8)*

# FÓTBÓLTSHAGTØL

## STØÐAN - 2. DEILD MENN

| Lið | Dystir | V | J | T | Mál | Stig | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. EB/S | 10 | 6 | 2 | 2 | 22-9 | 20 | 2-0-1 | 2-1-1 |
| 2. TB | 10 | 6 | 2 | 2 | 28-21 | 20 | 2-0-0 | 1-0-[illegible] |
| 3. ÍF | 10 | 4 | 5 | 1 | 20-8 | 17 | 1-0-1 | [illegible]-1-1 |
| 4. B36 | 10 | 4 | 2 | 4 | 20-18 | 14 | 0-1-1 | 1-1-1 |
| 5. NSÍ | 10 | 4 | 2 | 4 | 15-19 | 14 | 2-1-0 | 0-0-2 |
| 6. HB | 10 | 4 | 1 | 5 | 25-31 | 13 | 2-1-0 | 0-1-1 |
| 7. GÍ | 10 | 3 | 3 | 4 | 17-21 | 12 | 1-1-0 | 0-0-3 |
| 8. LÍF | 10 | 3 | 2 | 5 | 13-14 | 11 | 1-[illegible] | 1-1-0 |
| 9. KÍ | 10 | 2 | 3 | 5 | 11-22 | 9 | [illegible]-2 | 0-0-1 |
| 10. Royn | 10 | 1 | 4 | 5 | 11-19 | 7 | 0-0-1 | 1-2-1 |

Yvirlitið er ikki fullfíggjað

### Dystarskrá

Aðrir dystir í dag:

12.08 EB/S - TB
12.08 B36 - GÍ
12.08 NSÍ - LÍF
12.08 ROYN - HB

*1. deild menn - 12. umfar*

13.08 FSV - B36
13.08 B68 - SUMBA
13.08 GÍ - B71
13.08 VB - KÍ
13.08 HB - NSÍ

*3. deild menn - 12. umfar*

13.08 FSV - B36
13.08 B68 - TB
13.08 ÍF - B71
13.08 VB - KÍ
13.08 AB - SKÁLA

### Málskjúttar 2. deild

| | |
|---|---|
| Gunnar Mohr, HB | 7 |
| *Rúni Petersen, ÍF* | 5 |
| Kristian í Vági, LÍF | 5 |
| Bergur Djurhuus, NSÍ | 4 |
| Allan Michelsen, Royn | 4 |
| Johnny Samuelsen, B36 | 3 |
| Jón S. Gleðisheygg, EB/S | 3 |
| Henni Heinason, GÍ | 3 |

Yvirlitið er ikki fullfíggjað

### Málskjúttar hjá ÍF í landskappingini

| | |
|---|---|
| Rúni Petersen | 5 |
| Bárður á Lakjuni | 3 |
| Eyðolvur R. Petersen | 2 |
| Tórstein Joensen | 1 |
| Jógvan A. Jacobsen | 1 |
| Alvi Justinussen | 1 |
| Jákup Baldvinsson | 1 |

### Vert at vita

Næsti dystur hjá 1. liðið hjá ÍF verður leygardagin 19.08 í Gøtu ímóti grannununum. Næsti heimadystur verður leygardagin 26.08 ímóti B36.

3. deild spælir heima ímóti B71 í morgin. Næsta sunnudag leika teir heima ímóti KÍ í Klaksvík.

# PALFINGER

**Føroya mest seldi krani í 1997-1998-1999**

PALFINGER kranar verða framleiddir í Eysturríki. Palfinger er heimsins størsti kranaframleiðari. Kranarnir verða framleiddir úr hástyrkistáli og eru deseignaðir til tær torførastu arbeiðsuppgávurnar.



LASTBILAKRANAR 0,8 TIL 75TM
- FOLDIKRANAR
- TELESKOPKRANAR

MARINEKRANAR 2,1 TIL 83TM
- FOLDIKRANAR
- TELESKOPKRANAR
- STÍVARMSKRANAR
- KNEKKARMSKRANAR

**Lastbilakranar:**

| | |
|---|---|
| Kári Zachariassen p/f | PK19000C |
| Hans Egil Joensen p/f | PK19000C |
| Hans Egil Joensen p/f | PK24500E |
| Hans Egil Joensen p/f | PK54000E |
| Hákun Zachariassen | PK24500E |
| Erling Dam | PK16000C |
| Havnar Timburhandil | PK19000E |
| Tórshavnar Sløkkilið | PK18080C |
| Niklas Davidsen | PK19000C |
| Føroya Tele | PK9001A |
| Rodmund Andreassen | PK21000C |
| Salmon River p/f | PK5000A |
| ÓCS Fiskaflutningur | PK16000D |

**Marinekranar:**

| | |
|---|---|
| Faroe Slamon p/f | PK3700MA |
| Tórsvík m/s | PK19000MC |
| Vest Salmon p/f | PK3700MA |
| Tjømunes m/s | PK1600MA |
| Faroe Salmon p/f | PK3700MA |
| Vestfisk m/s | PK32080MB |
| Funningslaks - flaki | PK14080MA |
| Knykil m/b | PK5000MA |
| Sjólaksur p/f | PK8080MB |
| Vestborg m/s | PK23080MB |

**KJ - HYDRAULIK**

Boks 110 • FO-530 Kambsdalur • Fuglafjørður
Tlf. 44 41 70 • Fax 44 42 65 • E-mail: kj-hydr@post.olivant.fo



*Hárstovan Yndi*

*Súsanna K. Róin · Norma Egholm*

*530 Fuglafjørður · tel. 44 44 90*

**Landsins besta og størsta úrval av ítróttarheiðursgávum**




**Gravering ókeypis!**

Vit seta títt búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað

FA. **EILIF ARGE**

KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK
TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76

**FERÐASEÐLAR**
**KRING ALLAN KNØTTIN**

Travel Agent

FONN FLOG



N.P. Gøta 28
Box 109
FO-700 Klaksvík

Telefon 45 63 63
Telefax 45 73 73
T-postur: fonnflog@post.olivant.fo



Viðmerking:

# Ítótturin - seinna hálva

*Eftir Ditlev Róin*

Flest okkara liva í einum ávísum spenningi, um hvussu man fara at gangast tí ella teim fótbóltsliðum, sum hann ella hon heldur við. Ikki er hetta so undarligt, tí úrslitið í fyrru hálvu borgar ikki altíð fyri eini ábending um, at hin seinna gongur á sama hátt. Spennandi er tí at fáa nakrar dystir leiktar, at meta um styrki, treystleika og ikki minst hvussu hin innara síðan á høvdinum verður nýtt, sum helst gevur tey góðu úrslitini, um beinini fylgja teim boðum úr heilanum koma.

Umstøðurnar at íðka ítrótt eru so nógv broyttar síðan í fimtiárunum, at tú sum áskoðari illa dugir at sammeta úrslitini við tátíðina, men tá tú onkuntíð ert so heppin, at síggja eitt svart/hvítt kut av "internationalum" dysti frá hesi tíðini, er torført at trúgva tí tú sært, ferðin er munandi lakari, samanspælið liggur á einum øðrum pláni, tyktist sum leikararnir høvdu nógv betri stundir, taktingarnar eru ikki eins neyvar og í dag o. s. frv.

Tó enn er eitt felags, altíð hevur ligið fremst, at umráðandi er at leika góðan leik, og ikki minst gleðin um at leika, hevur verið sett í hásæti, tí tá bólturin verður skotin í málið, verður hin hepni leikarin hjartaliga heilsaður, bæði av viðleikarunum og áskoðarunum.

Vit uttanfyristandandi vita altíð ógvuliga væl, hvussu leikarar áttu havt leikt í hesi ella hasi støðu, og tað er helst í lagi, men hetta verður ikki umrøtt á hesum sinni, tí neyvan duga vit til fulnar at síggja rættu støðuna, júst í teirri løtu leikarin stendur í.

Latum okkum tí heldur royna at stuðla, og fáa tað besta burturúr enn bert at finnast at, tí eitt er givið, øll rætthugsandi ítróttarfólk leggja alt í, fyri at fáa úrslitið so gott sum tilberð, men ikki eru allir dagar eins góðirhjá eini íðkandi kvinnu/manni, eins og hjá okkum sum bert eru áskoðarar.

Verið góð við okkara ítróttarfólk, gevið teimum allan "moralskan" stuðul, tí hesi fólk geva okkum minni virkisfúsnu, ógvuliga nógvar góðar og gevandi løtur.

Góðar ítróttarløtur eru heilivágur fyri sálina, tøkk fyri tað, okkara fagri og góði ungdómur.

Við ynskjum um happadrúgva framtíð!

Ditlev

(framhald frá bls. 3)
komandi ár ikki minni enn tey hava verið í ár. -Hørð og miðvís venjing. Góð uppmøting og góður innsatsurin hvørjaferð. Tað mugu tit leikarar gera tykkum greitt. Vit vita, at tit megnað hettar um viljin er har, men tað krevur so, at komandi dystir leikliga verða nógv betri, og á einum nógv javnari støðið. -Og ikki minst, at tit vinna dystirnar!!!!

Part av tí leistinum løgdu tit í Leirvík seinasta vikuskiftið, tá tit vunnu 0-2, meðan seinasta partin kunnu tit leggja í dag, sum tit so harvið byggja víðari á. Vit á bakkanum vilja gera okkara besta, men størsti parturin er í tykkara hondum á vøllinum. Vísið okkum og klaksvíkingum at tað er í bestu deildini tit eiga at verða. Drívið á og vinnið dystin í dag!!!

**Flymo plenuklipparar**



*Vit senda um alt landið!*

Thomas Dam á Hálsi

Heykavegur 1 - Postrúm 2148 - 110 Tórshavn
Tel. 31 14 00 - fax 31 55 74



# Drívið á dreingir ....og vit dríva á!!!



MIKLAGARÐUR

SMS Tel 31 30 11

# Høvuðsstuðul hjá 1. lið monnum

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

# takkar Miklagarði fyri sýndan stuðul í fótbóltskappingar-árinum 2000

B S

P/F BOÐASTEINUR

Bakkavegur 26
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
Tlf. +298 44 48 00
Fax +298 44 48 40
E-mail: alibo@post.olivant.fo

*Blómuhandilin*

**Orkis**

*625 Glyvrar*

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

*tel 44 82 89*
*fax 44 89 89*

**Sp/f**
**Alfa Seafood**

**530 Kambsdalur**
Tel. 44 49 51
Fax 44 49 48
Fartel. 28 36 51
T-postur: alfa@post.olivant.fo

SANDGREVSTUR P/F

Stovnað 1949 - reiðari innan frakt- & sandbátar

**Vit hava altíð á goymslu**
- **stoypisand**
- **pussisand**
- **norskan góðsku sand**
- **rall**
- **sandblásisand**

**Koyring við kranalastvognum fyri fastar prísir**

Norður í Gerði 7, FO-530 Fuglafjørður
**tel.: 44 41 21 · fax 44 49 21**

HAVSBRÚN

Høvuðsstuðul hjá
1. lið monnum

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
takkar
P/F Havsbrún
fyri sýndan stuðul í fótbóltskappingarárinum 2000
og ynskir teimum tilukku
við heitinum
"Ársins virki 1999"

# Altíð nýbakað breyð

***Sunnumorgnar fæst morgunbreyð hesum støðum:***

**Statoil í Leirvík**
**Statoil í Saltangará**
**Kiosk Vár í Saltangará**
**Statoil á Strondum**
**Hjá Rannvá í Søldarfirði**




530 Fuglafjørður • tel./fax 44 43 88

# Takrennan skiftast?

***....hygg inn til okkara.***

**Vit hava stórt úrval av takrennum**

***....fyri ein sámuligan prís***

**P/F Fuglafjarðar Timburhandil**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444126**

# Vit hittast í

fk

# Fuglafjørður

# FUGLAFJØRÐUR




# Fuglafjarðar Kommuna

## ÍF Ítróttarfelag Fuglafjarðar

1. Allan Joensen
2. Jens Chr. Eldevig
3. Alvi Justinussen
4. Viggo Johannesen
5. Tomek Przbylski
6. Roy Róin
7. Eyðun Ryggshamar
8. Mortan Thomsen
9. Rúni Petersen
10. Bárður á Lakjuni
11. Eyðolvur R. Petersen
12. Bogi Nón
13. Tórstein Joensen (liðsk.)
14. Ken Bærentsen
15 Janus Petersen
17. Jógvan A. Jacobsen
18. Høgni Zachariassen

**Venjari:** Petur Mohr
Hj.venjari: Bogi Lervig
**Liðleiðari:** Símun Fornagarð



**Dómari**

**Petur Reinert**
Linjuverjar úr LÍF

# in í dag

Bóltsponsorur
ANNA
GROUND FLOOR

## KÍ Klaksvíkar Ítróttarfelag

*Meinhard Joensen*
*Atli Danielsen*
*Jóhannus Færø*
*Poul Juul Vilhelmsen*
*Finn Baldvinsson*
*Fríðin Ziskasson*
*John Ryan*
*Simun Joensen*
*Tomislav Sivic*
*Andreas Josephsen*
*Torleif*
*Hans Kristiansen*
*Gunnleivur Biskupstøð*
*John William Joensen*

***Venjari:*** *Andreas Josephsen*

*Leikarayvirlitið er vegleiðandi*



*Vit gera allar umvælingar, t.d. dekkskift, oljuskifti og annað mekaniskt.*

**Bilverkstaðið**

v/Magnus Onghamar
Kambsdalur
530 Fuglafjørður
Tel./fax 44 49 43

TASJAN Á BUGNUM



MÁLING

TAPET

GÓLVTILFAR

INNRAMMING

RUKO - BILLYKLAR

O.A.

RING

445044

# BAADER®

***Vit hava hópin av eykalutum til BAADER - maskinur á goymslu***

## Pf PETUR LARSEN

**Postmoga 64 · Traðarvegur 7 - 530 Fuglafjørður**
**tel. 44 41 74 - fax 44 42 85**

## *Fótbóltsskógvar*

Cellerator GC



1299,-

King Top



899,-

Pinto GC



599,-

PUMA®

## P/F THOMAS DAM

ÍTRÓTTUR N. Finsensgøta 5 Postmoga 1108 110 Tórshavn tel. 31 14 03

# Hesi stuðla 1. liðið við venjingarbúnum

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Restaurant Muntlan | 2 | Internetcaféin VEGA |
| 3 | KJ-HYDRAULIK | 4 | Hjá Marjun |
| 5 | Parfumarí Ninni | 6 | Hárstovan Yndi<br>Súsanna K. Róin · Norma Egholm<br>530 Fuglafjørður · tel. 44 44 90 |
| 7 | JT-electric | 8 | Normek |
| 9 | Curri | 10 | BAADER® |
| 11 | Salong Fløkjan | 12 | anna |
| 13 | BAADER® | 14 | Sp/f Alfa Seafood |
| 15 | SANDGREVSTUR P/F<br>Norðuri í Gerði 7<br>530 Fuglafjørður<br>tel. 44 41 21 fax 44 49 21 | 16 | fk Fuglafjørður |
| 17 | S.V. Transport | 18 | Kári Zachariassen Pf.<br>Lastvognskoyring<br>530 Fuglafjørður<br>tel. 44 42 45 fax 44 50 45 |
| 19 | KATRIN® | 20 | HARALDSEN<br>- títt keyp - |

Ítróttarfelag Fuglafjarðar takkar fyri stuðulin

Í Vørðsluni skorað tyggum altíð



VØRÐSLAN WEARHOUSE

FUGLAFJØRÐUR

Tel. 44 47 47 Fax 44 47 80

CHASSÉ

C·C·D·K

Repeat

Brandtex for every body

SHINE

WEARHOUSE SCANDINAVIA





Sparikassin
er tann rætti,
tá ið tað
snýr seg um
at ráðgeva ungum
í peningamálum

FØROYA SPARIKASSI



**ØLL LASTVOGNS-KOYRING**

við kranabili verður gjørd

**Kári Zachariassen Pf.**

530 Fuglafjørður
Telf. 444245 • Fax 445045
Fartelf. 284245 • 287245




**HeimaBankin**

## Flytið heimanífrá...



Nú kunnu tygum eisini avgreiða tygara vanligu bankaørindi heima við hús á egnari teldu.

Ynskja tygum at fáa meira at vita, eru tygum altíð vælkomin at venda tygum til starvsfólk bankans, sum eru fús at greiða frá.

## ...tá ið best liggur fyri

FØROYA BANKI

*Øll sløg av trappum verða gjørd.*
*Tilboð verða givin.*



**JBS-TRÆ**

*530 Fuglafjørður*
*Tel. 44 47 84*




# Sjón fyri søgn

Tá ið Trygd bjóðar sínar tryggingar fram - góðar, einfaldar tryggingar og fyri rættan prís fyrstu ferð - so fellur príslegan á hesum tryggingum yvirhøvur. Tað er sjón fyri søgn!

Tryggja tær bíligar tryggingar í framtíðini.
Tekna húsa- og familjutrygging, ferða-trygging og biltrygging í Føroya Banka ella hjá Trygd.

**Rættar tryggingar**
**fyri rættan prís**

**TRYGD**

*... eitt fet fremri*

Tórsgøta 16 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11

# 2000 Ársins ÍF'ari 2000

## Dagsins maður

### Allan Joensen



*Í seinasta heimadystinum áðrenn summarsteðgin ímóti EB/Streymi, valdu áskoðararnir Allan til besta leikarin í dystinum. Hann gjørdi eisini ein góðan innsats, og fyri tað fær hann ein sunnudagsdøgurða fyri tvey frá Pól á Muntra.*

## Atkvøðutal

| | ÍF – EB/S | Íalt |
|---|---|---|
| Allan Joensen | 47 | 54 |
| Eyðolvur R. Petersen | 30 | 70 |
| Alvi Justinussen | 21 | 27 |
| Tomek | 8 | 8 |
| Jens Chr. Eldevig | 7 | 22 |
| Rúni Petersen | 4 | 7 |
| Mortan Thomsen | 3 | 16 |

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar hjá ÍF í landskappingini. Tann leikarin, ið veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast.


FA. EILIF ARGE
KLAKSVÍKSVEGUR 700 KLAKSVÍK
TLF. 45 51 64 FAX 45 75 76

- *Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.*
- *Ársins ÍF'ari fær eitt gávukort á kr. 1.000,-*
- *Leikari nr. 2 og 3 fáa hvør sitt gávukort á kr. 500,-*

Restaurant Muntra



- *Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.*

- *Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen*

HARALDSEN
- títt keyp -


## Atkvøðuseðil

2000 Ársins ÍF'ari 2000

Dystur: ____________



Nr. 1 (5 stig): ______________________
*Leikari*

Nr. 2 (3 stig): ______________________
*Leikari*

Nr. 3 (2 stig): ______________________
*Leikari*

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: ________________ Tel.: __________

- **Klæðir til børn frá 0-16 ár**
- **Skógvar til allar aldursbólkar**
- **Tógv**
- **Mynstur**
- **Stokkar**

**og mangt annað**

**Toystovan**

**530 Fuglafjørður**
**tel. 44 46 37**



ALT TIMBUR-,

FORSKALLINGS-

OG



JØRÐARBEIÐI

SP/F TIMBRA
BYGGIVIRKI
530 FUGLAFJØRÐUR
TEL 44 42 17 • FART. 28 86 96 - 28 82 17

*Føroya største úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir*



FARPACK

Staravegur 5, P.O. Box 171, FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
Telefon +298 35 30 00, Fax +298 35 53 10
E-mail: farpack@farpack.com

HEWLETT® PACKARD

Expanding Possibilities

*Heildarveiting av tí heimskenda merkinum HP (Hewlett Packard).*



Alt innan heimateldur, virkisteldur, servarar, prentarar, net og mangt annað....



Arbeitt verður fyri virkir, skúlar og stovnar.

Avtala um viðlíkahald av teld-um/teldukervi kann gerast út frá tygara tørvi.

## J-J. Teld

530 Fuglafjørður

tel.: 21 03 83

e-post: jjteld@post.olivant.fo

# Ein branddystur

*Eftir Signar á Brúnni*

***Greinin stóð í leikskránni til 1. deildardystin ímillum ÍF og KÍ seinasta ár. Tá lá KÍ í toppinum, meðan ÍF rótaði í botninum. Tí er okkurt sum ikki samsvarar við dystin í dag, men vit loyva okkum kortini at prenta greinina í blaðið hesaferð***

Tað var tann tíð, tá ið klaksvíkingar hugtóku allar føroyingar við sínum frálika fótspæli. Teir vunnu tann eina dystin fyri og annan eftir, og onnur lið høvdu fullkomiliga mist vónina, um nakrantíð at vinna á teimum aftur. "66-liðið", var tað kallað. Teir, ið tá mannaðu KÍ-liðið, eru enn kendir sum fyrrverandi KÍ-arar. Hvør minnist ikki tann framúrskarandi teknaran John Sigurd, ið hugtók allar áskoðarar, bæði teir, ið hildu við KÍ, og teir, ið hildu við mótstøðuliðnum? Tað var hesin sami John Sigurd, ið var venjari í Fuglafirði fyri nøkrum árum síðani, og førdi ÍF úr 2. upp í 1. deild.

Annar frálíkur teknikari á vøllinum var Jóanes, ið hevði sín egna stíl. Steinbjørn minnast allir fuglfirðingar. - Sterkur tekniskt eins og taktiskt. Hann var maðurin, ið stýrdi liðnum saman við Álvheðini, ið eisini var ein frálíkur spælari.

Afturi í verjuni vóru Eyðálvur, Karl Gudmund, Ólavur og Magnus - hvør treiskari enn annar. Hvør minnist ikki brandskotini frá Karl Gudmundi? - tað var ikki tespiligt at verða raktur av slíkum kanónskotum.

Fuglfirðingar fóru upp í 1. deild í 1971. Tað var eitt stórt stig at taka, men teir hugsaðu sum so: megna vit tað ikki tey fyrstu árini, so fara teir, ið verða settir til, at verða somikið sterkari, at einaferð fór at bragda. Og soleiðis bleiv- Í 1979 gjørdust fuglfirðingar føroyameistarar, og leggjast skal afturat, at teir vunnu allar dystirnar tað árið. Eisini teir "óyvirvinniligu" klaksvíkingarnir vórðu avsmurdir av fuglfirðingum. Soleiðis fara broytingar fram, og soleiðis fer tað helst altíð at verða.

Klaksvíkingar hava verið í einum aldudali í eina tíð - tá ið vit tala um fótbólt. Hetta ásanna teir sjálvir, tí ein skemtiligur klaksvíkingur tók soleiðis til orðanna einaferð, at KÍ-arnir hitaðu ikki upp longur, nei, teir tiðnaðu upp.

Í dag er vend komin í hjá klaksvíkingum. -Nú hita teir upp aftur, so tað forslær. Teir liggja fremstir í 1. deild, og mangt bendir á, at har verða teir liggjandi og fáa gullið, sum teir hava droymt um í nú mong ár.

Fuglfirðingar eru í einum aldudali í løtuni, og tað hevur gingið sera striltið at koma burturúr honum aftur. Dysturin ímóti KÍ verður ikki lættur, men alt kann henda. -Sjáldan hevur verið stórur munur ímillum hesi bæði liðini.

Tað hevur altíð verið eitt sera gott vinalag ímillum KÍ og ÍF, har ein góður ítróttarandi hevur valdað. Dysturin í dag verður spennandi. - KÍ-arnir leggja alla sína orku í henda dyst, fyri at verða á odd, meðna ÍF má stríðast av øllum alvi fyri at koma burturúr niðurflytingarvandanum, ið hóttir teir.

Einki er at ivast í, at talan verður um ein brann dyst. - Tvær teir síðstu ferðirnar hevur tað verið sera nær við. Men mótstøðuliðini hava báðu ferðirnar ligið omaná. Soleiðis verður ikki hesaferð. - Leikararnir vilja vísa okkum, KÍ-leikarum og viðhaldsfólki og annars øllum fótbóltsáhugaðum føroyingum, at tepru tapini seinastu dystirnar, hesaferð verða vend til sigur. Drívið á dreingir!

# 20 spurningar til leikarin



1. *Navn:* Bárður á Lakjuni
2. *Føðingardagur:* 10.10.78
3. *Starv:* Á P/F Vónini í Fuglafirði
4. ***Hvat er tín styrki á vøllinum?*** Tað man vera bóltførleikin (teknikkurin)
5. ***Hvat er tín veikleiki á vøllinum?*** Eri ikki sterkur defensivt
6. ***Hvar í Føroyum er torførast at leika?*** VB í Vági
7. ***Hvør er Føroya besti leikari?*** Todi Jónsson
8. ***Hvør er tín fyrimynd á fótbóltsvøllinum?*** Zidane og Figo - og eisini onkrir aðrir
9. ***Hvat er heimsins besta lið?*** Landslið: Frakland - feløg: Man. United
10. ***Á hvørjum vølli í heiminum kundi tú hugsað tær at spælt?*** Old Trafford í Manchester
11. ***Hvat dámar tær ÍF-áskoðararnar?*** Teir eru bara OK
12. ***Hvat heldur tú um tað, bløðini skriva um teg og annars fótbólt sum heild?*** Tað er á góðari leið, tó kundi 2. deild fingið meiri umrøðu
13. ***Hvørji frítíðarítriv hevur tú?*** Fótbólt, tvørfloytu, syngið í kóri, og okkurt afturat
14. ***Hvør rættur er tín lívrættur?*** Steikt flak - frá mammu, helst
15. ***Hvønn drykk dámar tær best?*** Mjólk
16. ***Hvørji klæðnapløgg dámar tær best at vera í?*** Joggingklæðum
17. ***Hvør er bók er tann besta tú hevur lisið?*** Bíblian er avgjørt tann bókin, ið talar mest til mín, tá eg lesi í henni
18. ***Hvør filmur er tann besti tú hevur sæð?*** Tað veit eg ikki rættuliga
19. ***Hvønn sjónleikara dámar tær best?*** Tað eri eg heldur ikki klárur yvir
20. ***Hvørjar framíðarætlanir hevur tú?*** Ein dag í senn, haldi eg

## Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Boks 94
FO-530 Fuglafjørður
tel. 44 46 36
mynttel. 44 46 20
fax 44 46 36

***Aðalnevndin***
Jón N. Olsen, *formaður*, tel. 444650
Roy Róin, næst*formaður*, tel. 445176
Símun Fornagarð, *skrivari*, tel. 444344
Andrea Lervig, *peningarøkil*, tel. 444267

***Fótbóltsnevndin***
Sonni Jensen, *formaður*, tel. 444975
Steinbjørn í Lambanum, tel. 444478
Sigfríður Abrahamsen, tel. 444138
Hildigarð Eliasen, tel. 444052

***Samskipanarleiðarar***
Diana B. Lervig, tel. 444845
Ragnhard Petersen, tel. 444353

***Venjarar***
***1. deild***
Petur H. Mohr, tel.
***3. deild og unglingar***
Bogi Lervig, tel. 444845
***4. deild***
***5. deild***
Atli Larsen, tel. 444583
***Old Boys***
Sonni Jensen, tel. 444975
***Dreingir, smádreingir, piltar***
Sofus Baldvinsson, tel. 444645
***Smápiltar a og b***
Jóhan Símun Joensen
***Gentudeildin***
Sigfríður Abrahamsen, tel. 444138
***Smágentur***
Henry Petersen, tel. 444018
***Gentur 10-12 á og pinkur***
Jenny Niclasen

# Sølubúðin

## - í ovaru hæddini...

## *Prísir*

Kaffi
Te
Heimabakað køka **5,-**
Sunkist

Toast
Sodavatn 1/2 ltr. **10,-**

Fleiri sløg av sigarettum



***Eisini fæst ymiskt góðgæti til keyps fyri sámuligan prís.***

*......hevur opið meðan*
*2. deildardysturin er*

# DAEWOO

**Ringið og biðið um faldara og príslista**

## Ein skilagóð avgerð...




**KUMHO** *DEKK*

**Dekk til allar bilar - tosið við forhandlararnar**






*Matiz*



*Lanos*



*Leganza*

DAEWOO

*ein góð loysn...*


**P/f Esmar Simonsen**
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29